# Atlantsflog vendi aftur

**Flogfarið hjá Atlantsflog, sum var á veg til íslands herfyri, vendi aftur, tí flogskiparin varnaðist okkur brek við teknikkinum**

FLOGFERÐSLA

*Edvard Joensen*

Á veg til íslands herfyri varnaðist ein floskipari hjá Atlantsflogi, at okkurt var í ólagi við teknikkinum hjá flogfarinum. Hann tók ongar kjansir og vendi aftur í Vágar at fáa brekið umvælt.

Magni Arge, stjóriá Atlantsflogi, váttar, at flogfarið tann eina túrin vendi aftur. Hann váttar eisini, at talan var um tekniskar trupulleikar. Meira vil hann ikki siga. Hevur ikki hug at viðgera detaljur, sigur hann.

– Og so nyttar tað so lítið at spyrja meg um tað tekniska, tí tað hava onnur betri skil á, enn eg havi, sigur stjórin á Atlantsflogi.

Men hann vil ikki siga, hvør so er betri egnaður at diga, hvat tað var, sum hendi. Tað er stjjórin, sum úttalar seg alment um felagið, sigur hann, og vil ikki koma inn á, um tað var eitt hendiligt tekniskt brek, ella tað var ein menniskjaligt mistak, sum gjørdi, at ikki alt riggaði, sum tað skuldi.

Magni Arge leggur dent á, at flogfarið er útgjørd við dupultari útgerð allastaðni, soleiðis at um eitt gongur fyri, er tað næsta klárt at taka við. Soleiðis var eisini hetta kvøldið, og tað var avgjørt ongantíð nakar vandi fyri trygdini.

Flogskiparin valdi at binda um heilan fingur og vendi aftur beinanveg, hann varnaðist óreglusemið. Flogfarið varð umvælt í Vágum og helt so afur til Íslands og kom heim aftur sama kvøldið, sigur Magni Arge.



*Flogfarið hjá Atlantsflog, sum var á veg til Íslands, fekk tekniskar trupulleikar og vendi aftur. Stjórin vil ikki siga, hvat tað var, sum hendi*

# Absalon vitjar



*Absalon er nýggjasta og best útgjørda skipið hjá danska herflotanum*

**Nýggjasta og størsta skipið hjá danska herflotanum, Absalon, kemur til Føroya um vikuskiftið**

FLOTAVITJAN

Stásiliga herskipið Absalon hjá donsku verjuni, kemur til Føroya um vikuskfitið og fer her at hava venjingar saman við sjóverjuskipinum Vædderen, sigur Færøernes Kommando í tíðindaskrivi.

Vant verður í Nólsoyarfirði sunnudagin 16 januar, stendur í tíðindaskrivinum.

Absalon skal saman við einum systurskipi, sum enn ikki er liðugt og navngivið, vera høvuðsstuðulin í altjóða uppgávum, sum danski herflotin í framtíðini fer at taka lut í. Skipini fara at vera útgjørd til bæði hernaðarligar og humanitærar uppgávur.

Fyrsta royndin hjá Absalon eftir at hann hevur verið í Føroyum, verður at royna, hvussu skipið klárar ymsar veðurfrøðiligar umstøður. Bæði í Norðuratlantshavinum og í tropunum, sigur Færøernes Kommando í tíðindaskrivinum.

**ej**

# Avgjaldið verður verandi

**Oljuavgjaldið á flogferðaseðlum, sum var ásett herfyri, verður verandi eina tíð enn**

AVGJALD

Oljuavgjaldið á flogferðaseðlum verðuru ikki tikið av aftur fyribils. Til tess er altjóða oljuprísurin ov høgur, siga flogfeløgini.

Fólk eru farin at halda, at nú man oljuavgjaldið á flogferðaseðlum skjótt fara at verða tikið av, tí nú er brýfrítt bensin til bilar so bíligt. Og tað mátti saktans smittað eitt sindur av á brennievnini til flogførini.

Men soleiðis hongur tað ikki saman sigur stjórin á Atlantsflogi. Hetta hevur einki við hvørt annað at gera.

Magni Arge, stjóri á Atlantantsflogi, sigur, at avgjørt er, at so leingi altjóða oljuprísurin er oman fyri 35 dollarar fyri tunnuna, verður avgjaldið ikki tikið avaftur. Fríggjamorgunin var prísurin 45 dollarar fyri eina tunnu, so tað tykjast ikki serliga góð útlit fyri eini avtøku, heldur hann.

Talið 35 dollarar er eitt tal, sum fleøgini eru samd um. Tað er í grundini týska flogfelagið Lufthansa, sum hevur sett tað á, sigur Magni Arge. Og hesum støðinum fer Atlantsflog eisini at fylgja, sigur hann.

**ej**



*Oljuavgjaldið, sum dýrkar flogferðaseðlarnar, verður eftir øllum at døma ikki tikið av við tað fyrsta*